Stóra bringu

-ella lítla?

Visti tú at 80% av øllum kvinnum ganga í skeivari BH-stødd?

Vælkomin inn á gólvið hjá okkum og vit hjálpa og vegleiða tær at finna júst tína stødd. Ring til okkum og avtala tíð.

Vit hava BH í støddum úr 65 til 110 cm. í ummáli, og frá AA til H skál.

Vit hava eisini korsilett í stórum støddum

siri liv & heilsa

Dr. Jacobsensgøta 18
100 Tórshavn
Tel./Fax 316610

Føroya største úrval av

PAKKITILFARI

úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir

Vit útvega eisini:

* Plastbakkar
* Pakkibond, tape
* Merkir, etikettir
* Knívar
* Kitlar, húgvur, handskar, svintur o.l.
* Ymisk tól til ídnaðin
* Reingerðisevnir
* Tilsetningsevnir
* Plattar
* Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

...sjálvandi til besta prísin!!

FARPACK

Staravegur 5, P.O. Box 3099
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 35 30 00
Fax +298 35 30 10
E-mail: farpack@farpack.com

Sp/f VVS-HORNIÐ
Lágpríshandil

Alt innan hitaverk & sanitet so sum:

- Stoypijarnsketil
- Sanitet
- Kranar
- Baðirúmsmøblar

Støkk inn á gólvið ella ring

Landavegur 2 - 100 Tórshavn
Tel. 318023 - Fax 310963

Sosialurin - 311820

Reyði krossur Føroya

Sorgarlinjan hjá Reyða Krossi Føroya svarar mánad., mikud. og fríggjad. frá kl. 19[00] til 21[00]

☎ 212380

Blomberg®

Komfort-katalyse ovnur Beo 632

Fyrr 4.790,- NÚ 4.311,-



Blomberg®

Komfort kókipláta MC 603

Fyrr 4.090,- NÚ 3.681,-

pf.KLEMENT PETERSEN

Høgaból • 600 Saltangará • Tel. 44 75 60 • Fax 44 84 60

Sosialurin - 311820

Sig okkum frá

Hendir okkurt, sum er áhugvert hjá øðrum at vita, eru vit til reiðar at bera tíðindini víðari.

Sosialurin leggur seg eftir at bera tíðindi úr øllum landinum.

Vit koyra runt í tí kenda, gráa Toyota bilinum við eyðkendu frámerkjunum.

Ferðandi blaðstjórnin er dagliga úti kring landið. Vit eru at hitta á telefon nr. 31 18 20. Telefax nr. 31 47 20.

Edvard Joensen mannar í løtuni ferðandi blaðstjórnina. Hann er at hitta á telefon nr. 42 36 17 ella á fartelefon nr. 22 05 07. Eisini ber til at senda teldupost til:

edvard@sosialurin.fo
ella post@sosialurin.fo

Tíðindablaðið sosialurin

JÄSPI KETLAR

Teir vælumtóktu ketlarnir eru á goymslu



Bæði dupultir og einkultir

Skulu tygum hava nýggjan ketil, so tosið við okkum og fáið eitt gott tilboð. Vit hava serkøn fólk, ið geva eina skjóta og góða tænastu.

- Alt tilfar til hitaverk og sanitet fæst hjá okkum

MARIA POULSEN & CO
Smyrilsvegur 8 - tlf. 312000

Hjá okkum fáast vognar og útgerð til allar flutningsuppgávur!

- Viðfestisvognar sum lasta frá 325 kg. upp til 2.600 kg. –nógv model!'
- Eykalutir til viðfestisvognar
- Sekkjavognar, hydr. lyftiborð –arbeiðsbord
- Vognar til gassfløskur, oljutunnur, kassar, trappir –óteljandi møguleikar!
- Gafflar til heisan av plattum, vøru o.a.
- Tip - Ruskkonteinarir til trukkar
- Spennireimar og lyftistroppar
- Sleipikrókar til øll bilmerki!

Tosið við okkum!

Kaj Andreasen & Co

Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008

Sosialurin - 311820

Vikuskifti

Nr. 218 • leygardagur • 11. november 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo



Eg elski bøkur

Sigur Martin Næs landsbókavør›ur

sí›a 18-19

Skúli sí›ani 1547

SØGA Jens Marius Hentze, lærari skrivar "Tórshavnar Skúlasøgu", sum nú kemur út í bók. Elsta skjali› hann hevur funni› er 453 ára gamalt

Birgir Kruse

Tórshavnar B‡rá› hevur tiki› stig til at skúlasøga høvu›ssta›sins ver›ur skriva›. Og nú er hon í nánd. Innan mána›in er úti ver›ur henda forvitnisliga bók vi› hópin av uppl‡singum løgd fram fyri almenninginum. Rithøvudurin aftanfyri rúgvusmiklu skúlabókina, hon telur 530 sí›ur, er Jens Marius Hentze. Í vævi er bókin heilar hundra› sí›ur drúgvari enn ein líknandi skúlabók, nevniliga bókin, sum l‡sti 100 ára søgu Føroya Lærarafelags. Árni Dahl ritstjórna›i hesi stásiligu bók, sum taldi 430 sí›ur og kom í 1989, tá Lærarafelagi› fylti hundra›. Um somu tí› kom bókin "Føroyskir fólkaskúlalærarar", sum ikki bert l‡sir limir Føroya Lærarafelags, men eisini farnar lærarar í Føroyum, heilt aftur til 1870.

N‡ggja bókin "Tórshavnar skúlasøga" l‡sir vi› or›um, skjølum og myndum umstø›urnar innan skúlagátt í Havn frá byrjan í 1547. Greitt ver›ur frá latínskúlanum, danska skúla, almúguskúlanum, arbei›sskúlanum, realskúlanum og skúlagongdini í kommunalu og privatu skúlunum í 20. øld. Ein partur í bókini er um skúlarnar í Kaldbak og Hoyvík, á Hvítanesi og Argjum. Eisini ver›ur skriva› um virksemi› hjá kvøldskúlanum og musikkskúlanum, sum seinni komu til. Í bókini er eisini yvirlit yvir lærarar í barna- og realskúlanum, sum vi› gloppum røkkur aftur til umlei› 1660.

Rithøvundurin Jens Marius Hentze er útbúgvin lærari frá Føroya Læraraskúla 1964. Fyrsta ári› sum lærari var hann í Hvalba, men sí›ani 1965 hevur hann veri› í Kommunuskúlanum í Havn. Í stuttum vi›tali, nú bókin um Tórshavnar skúlasøgu á sí›sta sinni er til rættlestur, sigur Jens Marius, at ætlanin er, at bókin kemur út innan november mána›i er úti.

Umframt skúlasøguna, hevur Tórshavnar B‡rá› eisini í umbúna› at skriva eina b‡arsøgu, so sum ein arbei›sbólkur, settur av B‡rá›num, skjeyt upp fyrr í ár.



Jens Marius Hentze, lærari í Kommunuskúlanum í Havn, skrivar Tórshavnar Skúlasøgu

Mynd: Jensk Kristian Vang

Føroyskir pengar í donskum filmi

BROTSMENN Í Danmark er n‡ggjur filmur komin fram, sum l‡sir har›renda lívi› í undirver›ini, júst sum var ta› Tarantino og Scorsese í USA. Og ta› eru føroyskir pengar, i› seta fer› á søguna. Skuldareyvin Søren Pilmark skyldar nevniliga einum har›rendum asfaltsføroyingi pengar

F‡ra brotsmenn, Jeppe Lie Kaas, Mads Mikkelsen, Ulrich Thomsen og Søren Pilmark, møta føroyinginum

Birgir Kruse

Í donskum biohallum hevur filmurin "Blinkende lygter" gingi› í eina viku. Hetta er fyrsti filmur sum Anders Thomas Jensen letur rulla. Tó, tá vit siga fyrsti, skulu vit taka ta› vi› fyrivarni. 28 ára gamli Anders Thomas Jensen er einasti dani, sum tríggjar fer›ur upp í slag hevur veri› í uppskoti at fáa tiltiknu Oscar-vir›islønina. Ta› var fyri stuttsøgufilmarnar "Ernest og lyset" í 1997, "Wolfgang" í 1998 og "Valgaften" í 1999. Í hesum tri›ja førinum eydna›ist. Danski Jensen eigur sostatt ein gyltan Oscar.

Umframt at hava gjørt hópin av stuttfilmum, hevur Anders Thomas Jensen eisini skriva›, ella medvirka› í søgunum, sum fleiri n‡ggir og stílskapandi danskir filmar byggja á. Teirra millum eru "Mifunes sidste sang" og "I Kina spiser de hunde". Í løtunu skrivar hann saman vi› Søren Kragh-Jacobsen handriti› til filmin "Skagerak".

Ivaleyst hevur hesin evnaríki unglingi møtt føroyingum í Keypmannahavnska náttarlívinum ella kann henda í døkku undirver›ini. Føroyingar, sum eta fisk og alt sum fyri er — vi› skræ›u! Har›rendir búllar, sum herja beint á og ikki smæ›ast fyri dirty tricks, tá skuldin skal inndrívast. So nú er at siga takk fyri sí›st og dríva ta› inn, sum hann eigur á. Føroyingurin hjá dananum. Skuldin skal gerast upp, ta› er kjarnin í filminum "Blinkende lygter".

Høvu›sleiklutin í hesum n‡ggja filmi hevur Søren Pilmark. Hann er brotsma›urin Torkild, i› skyldar "Føroyinginum" pengar. Ikki ni›urlagda bla›num, men har›renda pengalánaranum úr Føroyum. Henda leiklut hevur Peter Andersson. Og so tyngjandi og balst‡rin er hesin leiklutur, at eyglei›arar í Keypmannahavn, sum Havnar Bio hevur samband vi›, ráddu frá at taka filmin heim til Føroya, tá útleigufelagi› ScanBox bjó›a›i hann fram. Filmurin er rein provokatión, var› sagt. Tí ver›ur hann ikki vístur í Havnar Bio.

Í Havnar Bio siga tey annars, at áhugin fyri donskum filmum er mest sum horvin seinastu árini. Okkurt bendir á, at danskir filmar ikki longur hava "sympati" millum føroyskar ásko›arar. Men undantøk eru. Teirra millum er fyrst og fremst Bille August og allir filmar hansara og so eisini teir bá›ir filmarnir "Breakin’ the waves" og "Nattevagten", sum bá›ir gingu heilt væl, sigur lei›arin í Havnar Bio. Ta› tykist sum Lars von Trier i› hevur gjørt "Breakin’ the waves" hevur ein avmarka›an, men avgjørdan skara av vi›haldsfólkum í Føroyum. Tí fara vit eisini at s‡na n‡ggjasta film hansara "Dancer in the dark" á Listastevnu Føroya í august næsta ár. Kann henda, at vit vísa hann innan. Men í hvussu er eisini á stevnuni í august, sigur Louis Jacobsen í Havnar Bio.